## Brúgv hoyknaði

Sjey arbeiðsmenn doyðu, og 15 aðrir fingu skaða, tá ein brúgv, sum stóð í gerð, hoyknaði í arabiska landinum Dubai gjár. Ein talsmaður hjá myndugleikunum segði, at tað var eitt brek við brúnni, sum gjørdi, at hon hoyknaði. Umleið 40 arbeiðsmenn vóru á brúnni, tá vanlukkan hendi. Brúgvin er í íbúðar- og handilsbýnum Dubai Marina, sum er vorðin sera væl umtóktur, og sum tí veksur skjótt, skrivar AP.




## SAS nýggjar rutur

Skandinaviska flogfelagið SAS fer næsta ár undir tvær nýggjar rutur. Onnur verður millum Keypmannahavn og Dehli í India, og hin verður millum Keypmannahavn og San Fransisco. Ætlanin er at flúgva tríggjar ferðir til Dehli og fýra ferðir til San Fransisco um vikuna. Lars Sandahl hjá SAS sigur við danskar fjølmiðlar, at áhugin fyri India sum ferðamáli er vaksin nógv tey seinastu árini, samstundis sum landið er í stórum búskaparligum vøkstri. Tær báðar nýggju ruturnar koma á ferðaætlanina hjá SAS næsta heyst, og felagið fer at brúka eitt flogfar av slagnum Airbus 340 til báðar ruturnar.

# Føroyskir yvirmenn á promilluskipinum




*Eftir teir báðar tilburðirnar verður danska farmaskipið "SC Baltic" umrøtt sum promilluskipið*

**Føroyski yvirstýrimaðurin, sum hevði vakt, tá danska skipið "SC Baltic" fór á land í Noregi í fjør, er dømdur fyri at hava siglt ávirkaður av rúsdrekka. Í síðstu viku fór sama skip aftur á land í Noregi, og føroyski skiparin er skuldsettur fyri at hava siglt ávirkaður**

SIGLING
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Tann 55 ára gamli yvirstýrimaðurin var ikki hjástaddur, tá rætturin í Haugesund viðgjørdi mál hansara seinasta fríggjadag. Ígjøgnum verjan hevði hann voðað frá, at hann helt seg vera ósekan, men í gjár boðaði rætturin frá, at maðurin skal sita 25 dagar í fongsli og rinda 2.000 norskar krónur í sakarmálskostnaði.

Yvirstýrimaðurin hevði vakt, tá danska farmaskipið SC Baltic sigldi innanskerðs nærhendis Haugesund í Noregi grækarismessudag í fjør. Alt gekk eftir vild, men við Skåretreboen tók skipið botn. Stoyturin var so mikið harður, at skipið fekk skaða bógvin, botnin og róðrið, og sambært norskum fjølmiðlum kostaði umvælingin góðar fimm mió. krónur.

Myndugleikarnir komu upp í málið, og blóðroynd varð tikin av yvirstýrimanninum, sum hevði vakt, tá óhappið hendi. Kanningin vísti, at hann hevði í minsta lagi 1,56 promillu av alkoholi í blóðinum.

Yvirstýrimaðurin helt uppá, at hann var ikki ávirkaður av rúsdrekka. Um úrslitið av blóðroyndini segði hann, at tað mundi koma av dampi frá kemiskum evnum og heilivági og hostasevju, sum hann hevði brúkt.

Men teir tríggir dómararnir trúðu ikki hesari frágreiðingini hjá tí 55 ára gamla føroyska yvirstýrimanninum, men dømdu hann 25 dagar í fongsul fyri at hava ført skip ávirkaður av rúsdrekka.

### Sama søgan

Tíðliga seinasta leygarmorgun bleiv staðfest, at søgan endurtekur seg. Tá sigldi "SC Baltic" enn eina ferð á land í Noregi, og enn eina ferð var tað ein føroyskur navigatørur, sum hevði vakt á brúnni.

Tað eydnaðist danska skipinum at sleppa avaftur við egnari megi einar tveir tímar seinni. Men myndugleikarnir komu á staðið, og ein roynd við einum alkometuri vísti, at skiparin var ávirkaður av rúsdrekka. Tí varð avgjørt at taka blóðroynd av manninum, men hóast úrslitið av henni ikki er komið enn, er tann 37 ára gamli skiparin skuldsettur fyri at hava ført skip ávirkaður av rúsdrekka. Tað váttar løgreglan í Haugaland og Sunnhordland fyri norskum fjølmiðlum, men tað er ikki greitt, nær málið møguliga kemur í rættin.

Tað vísti seg, at "SC Baltic" hevði ikki fingið nakran stórvegis skaða av tilburðinum, og skipið fekk loyvi at halda leiðina fram til Danmarkar, tá reiðaríið hevði funnið ein annan skipara.

# FBI ávarar um yvirgang ímóti stórhandlum



**FBI hevur illgruna um, at al-Qaeda fyrireikar atsóknir at stórhandlum í Chicago og Los Angeles beint fyri jól**

HÓTTAN
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Ein nýggj frágreiðing, sum amerikanska samveldisløgreglan FBI hevur skrivað, og sum ABC News hevur fingið fatur á, ávarar amerikanarar um, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda hevur møguliga lagt ætlanir um at søkja at stórhandlum í San Fransisco og Chicago beint upp undir jól, tá nógv fólk er handlunum.

FBI minnir amerikanararnar á, at al-Qaeda hevur sett sær sum mál at oyðileggja amerikanska búskapin, men talsmaðurin hjá FBI, Richard Kollo, roynir samstundis at siss aamerikanararnar við at siga, at FBI hevur ongar ábendingar um, at hóttanin er verulig.

Richard Kollo sigur, at longu í september fekk samveldisløgreglan frænir av, at eitt ella annað kanska var á vás. Ætlanin var kortini ikki at kunna almenningin um tað, og tí var frágreiðingin, sum ABS News hevur fingið fatur á, ætlað til innanhýsis brúk í FBI, sigur talsmaðurin. Hann heldur tó ikki, at tað gera nakað, um almenningurin verður ávaraður.

– Aftan á 11. september er okkara fremsta mál at siga øðrum frá tí, sum vit vita, sigur Richard Kollo.

*Amerikonsku stórhandlarnir kunnu vera álopsmál hjá al-Qaeda upp undir jól, sigur FBI*